# Viðtøkur fyri fakligt forum fyri

# leiðandi sjúkrarøktarfrøðingar í Føroyum

**§ 1.**

Fakligt forum fyri leiðandi sjukrarøktarfrøðingar

**§2.**

Endamál

1. At styrkja og menna leiðarar av heilsu- og sjúkrarøktini

2. At veita hvørjum øðrum kollegialan stuðul í leiðsluspurningum

3. At eggja til eftir- og víðariútbúgving av leiðarum innan heilsu- og sjúkrarøkt

4. At luttaka í kjaki um klinisku útbúgvingina í grundútbúgvingunum

5. At eggja til menning og gransking innan leiðslu av heilsu- og sjúkrarøkt

6. At menna tvørfakliga og tvørsektoriella samstarvið innan Almanna- og heilsuverkið og kommunurnar

7. At ávirka umstøðurnar hjá heilsu- og sjúkrarøktini samfelagspolitiskt

Ad 1: At styrkja og menna leiðarar innan heilsu- og sjúkrarøkt

- At týðiligera leiðsluábyrgdina og styrkja leiðsluidentitetin
- At tryggja umboðan í viðvirkandi nevndum og ráðum

Ad 2: At veita øðrum kollegialan stuðul í leiðsluspurningum

- At verða eitt opið og lærandi kjakforum
- At samstarva um aktuel leiðsluviðurskifti, ið eru viðkomandi
- At gera netverk upp á tvørs av deildum, stovnum og sektorum

Ad 3: At eggja til eftir- og víðariútbúgving av leiðarum innan heilsu- og sjúkrarøkt

- At fyriskipa evnisdagar
- At halda seg kunnaðan við útbúgvingartilboð, menning og rák í londunum rundan um okkum

Ad 4: At luttaka í kjaki um klinisku útbúgvingina í grundútbúgvingum

- At samstarva við skúlarnar í grundútbúgvingunum
- At arbeitt verður fyri at fáa tilført ressursir til útbúgving- og menningartiltøk

Ad 5: At eggja til menning og gransking innan leiðslu av heilsu- og sjúkrarøkt

Ad 6: At menna tvørfakliga og tvørsektoriella samstarvið innan Almanna- og heilsuverkið og kommunurnar

- At samstarva um tvørfaklig menningartiltøk
- At samstarva um sjúklingagongdir upp á tvørs av sektorum
- At eggja til skiftisstørv millum deildir, stovnar og sektorar

Ad 7: At ávirka umstøðurnar hjá heilsu- og sjúkrarøktini samfelagspolitiskt

- At gera avvarðandi myndugleikar vart við viðurskifti, ið ávirka fólkaheilsuna
- At veita avvarðandi myndugleikum upplýsing og ráðgeving
- At gera tilmælir og ummæla viðkomandi mál og lógaruppskot
- At luttaka í samfelagspolitiskum kjaki

**§4**

Limir. Inn- og útliman

Sjúkrarøktarfrøðingar sum hava leiðslu sum virkisøki ella áhuga innan leiðslu og sum eru limir í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, kunnu gerast limir.

Sjúkrarøktarfrøðingar kunnu gerast limir við at venda sær til nevndina og melda seg út á sama hátt.

Tú er limur, tá tú hevur goldið limagjald. Limagjaldið skal verða goldið innan 1. Februar í inniverandi ári. Um ikki er goldið rættstundis og í seinasta lagi áðrenn árliga aðalfundin hjá FÁ6, verður tú strikaður sum limur.

**§5**

Limagjald

Aðalfundurin ásetur limagjald

Atkvøðurætt hava allir limir, ið hava goldið limagjald

**§6**

Nevndin

Nevndin verður vald á aðalfundi og leiðir bólksins arbeiði.

Nevndin hevur 5 limir og 2 eykalimir. Nevndin skipar seg við formanni, næstformanni, kassameistara og skrivara á fyrsta nevndarfundi eftir aðalfundin.

Valskeiðið er 2 ár. Fer nevndarlimur frá, tekur tiltakslimur við í hansara stað. Nevndarlimur kann veljast aftur

**§7**

Val

Nevndarval fer fram á aðalfundinum hvørt ár. 3 nevndarlimir standa fyri vali líka ár og 2 nevndarlimir standa fyri vali ólíka ár. Minst tveir eykalimir verða valdir á hvørjum ári.

**§8**

Nevndarfundur

Nevndin hevur minst 2 fundir um árið, ella so ofta sum formaðurin ella minst 3 av nevndarlimunum halda tað vera neyðugt.

Fundarfrásøgn skal skrivast á hvørjum fundi.

Nevndin er viðtøkufør, tá minst 3 limir eru á fundi

**§9**

Aðalfundur

Aðalfundurin er hægsti mynduleiki. Fundurin verður hildin í februar/mars við minst 14 daga varskó.

Bert limir kunnu luttaka.

Á aðalfundinum hevur hvør limur eina atkvøðu.

Á dagsskránni skulu vera hesi mál:

1. Val av fundarstjóra
2. Val av atkvøðuteljara
3. Góðkenning av dagsskránni
4. Frágreiðing formansins
5. Framløga av roknskapi og áseting av limagjaldi
6. Innkomin uppskot
7. Val av grannskoðara
8. Val av nevndarlimum
9. Ymiskt

Broyting av viðtøkum fer fram á aðalfundi við vanligum meiriluta.

Uppskot, sum skulu viðgerast á aðalfundinum, skulu vera nevndini í hendi 1. februar. Uppskotini skulu vera skrivlig. Øll uppskot skulu verða send limunum 14 dagar áðrenn ásetta aðalfundin.

Øll mál verða samtykt við vanligum meiriluta av teim uppmøttu á aðalfundinum.

**§10**

Eykaaðalfundur

Boðað skal verða til eykaaðalfund, tá nevndin heldur tað vera neyðugt ella um 25% av limunum skrivliga krevja tað.

Boðast skal frá skrivliga við 7 daga freist.

**§11**

Roknskapur

Roknskaparár er álmannakkaárið.

Nevndin skal syrgja fyri at greinaður roknskapur verður førdur yvir allar inntøkur og útreiðslur.

Rokniskapurin skal verða móðurfelagnum í hendi innan 1. februar. Rokniskapurin og grannskoðan skal góðkennast á aðalfundinum hjá FÁ6.

**§12**

Avtøka

Áhugafelagið kann ikki takast av uttan so, at 2/3 av limunum, ið møttir eru á aðalfundi, atkvøða fyri avtøku.

Aðalfundurin ger í sambandi við avtøku av, við góðkenning frá Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar, hvat skal gerast við ognir áhugabólksins.

Soleiðis samtykt á stovnandi aðalfundi

Í Tórshavn, tann 11. november 2003

Broytingar viðtiknar á aðalfundi

24. november 2006

Broytingar viðtiknar á aðalfundi

19. februar 2010

Broytingar viðtiknar á aðalfundi

6. mars 2015

Broytingar viðtiknar á aðalfundi

21. februar 2020

Broytingar viðtiknar á aðalfundi

16. apríl 2021

Góðkendar av Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar 20.01.2022

Broytingar viðtiknar á aðalfundi

21. februar 2025

Góðkendar av Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar 2025